

*- Heilt síðan eg byrjaði at fiska, hevur tað víst seg, at útlitini mangan eru døpur við byrjanina av einum nýggjum ári. Soleiðis er eisini, nú vit eru komin inn í 2011, sigur Mikkjal Hammer, reiðari*

hann skal ikki taka dagar ímillum, um skipini hjá teimum hava fiskað fyri meiri enn Vestmenningur og Fram, men hann dylur ikki fyri, at hann sum reiðari er ómetaliga væl nøgdur við gongdina í farna ári.

Tá vit spyrja, um veiðivirðið liggur omafyri 40 miljónir krónur, sigur hann, at tað liggur "væl omanfyri", men júst, hvussu nógv talan er um, er hann eitt sindur trekur at siga okkum.

- Vit hava ikki neyva talið fyri alt árið enn, men taka vit veiðina fyri hvønn dag í sjónum, er eingin ivi um, at Hamranes og Breiðanes liggja í oddinum, leggur hann aftrat.

Reiðarin er sera væl nøgdur við gongdina.

- Tá hugsað verður um, at Breiðanes misti 20-25 dagar, tá trupulleikar vóru við gearinum í mai, og Hamranes tá gjørdi ein vánaligan túr saman við Steintóri, eru vit sera væl nøgdir. Lastin hjá okkara skipum er bara helmingurin av lastini hjá fleiri av teimum størru partrolarunum, og haraftrat kemur, at upsaveiðan vanliga er vánalig í tíðini, tá tey størri pørini eru á gulllaksaveiði.

Reiðarin vísir á, at upsaprísirnir vóru góðir í farna ári og gingu uppeftir alla tíðina. Hinvegin royndist upsaveiðan ikki nakað serlig í seinnu hálvu av árinum.

- Tá havt verður í huga, at 85% av veiðini hjá Hamranesi og Breiðanesi er upsi í 2010, eru vit sjálvandi rættiliga væl nøgdir.

Hann sigur, at meginparturin av veiðini hjá skipunum er landað í Hvalba, men onkran einstakan túr í 2010 vóru skipini í Scrabster.

### Skiparar úr Hvalba

Teir, sum føra partrolaraparið úr Hvalba, eru ávikavist Tórhallur Randrup við Breiðanesi og John Martin Poulsen við Hamranesi. Báðir eru hvalbingar.

Mikkjal Hammer sigur, at teir, sum loysa skipararnar av, tá hesir hava frítúr, eisini eru hvalbingar.

- Bæði skiparar og manning hava gjørt eitt ómetaliga gott arbeiði, síðan vit keyptu hesi skipini til Hvalbiar, sigur reiðarin.

Sosialurin spurdi eisini Mikkjal Hammer, hvussu hann metir útlitini vera fyri árið, sum júst er byrjað.

- Heilt síðan eg byrjaði at fiska, hevur tað víst seg, at útlitini mangan eru døpur við byrjanina av einum nýggjum ári. Soleiðis er eisini, nú vit eru komin inn í 2011. Tú veitst ongantíð frammanundan, hvussu árið fer at vignast, og soleiðis er eisini hesaferð.

Mikkjal Hammer ásannar, at upsasveiðan var svikalig í 2010, serliga í seinnu hálvu, men hann vónar, at árið kortini fer at roynast.

- Vit fara at gera okkara besta, og vit vóna, at hetta fer at røkka, tá samanum kemur, sigur reiðarin í Hvalba.

*vilmund@sosialurin.fo*



*Norski fiskimálaráðharrin, Lisbeth Berg Hansen, hevur sent Fiskimálaráðnum áheitan um nýggjar samráðingar*

# Noreg »fríggjar«

**FISKIVINNA Tað er ikki víst, at fiskiveiðisáttmálarnir, sum Føroyar hava havt við Noreg og ES, hava so lítlan týdning fyri londini kortini, nú Noreg aftur vil samráðast um avtalu**

Vilmund Jacobsen

Norski fiskimálaráðharrin, Lisbeth Berg Hansen, ynskir eftir øllum at døma, at Noreg og Føroyar taka uppaftur samráðingarnar um nýggjan fiskiveiðisáttmála millum londini.

Samráðingarnar slitnaðu tíðliga í desember, tá Noreg tvinnaði samráðingarnar um býtið av felagskvotuni av makreli upp í samráðingarnar um árligu fiskiveiðiavtaluna, sum londini í fleiri ár hava havt sínámillum.

Føroysku samráðingarumboðini hildu upp á, at býtið av makrelinum einki hevur verið árligu samráðingarnar um fiskiveiðiavtalu at gera, men er ein spurningur fyri seg.

Nú bendir so alt á, at Noreg ynskir nýggjar samráðingar við Føroyar um sínámillum fiskiveiðiavtalu fyri 2011.

Hetta kom fram í endanum av seinastu viku, tá Noreg vendi sær aftur til Føroya um samráðingar.

Norski fiskimálaráðharrin, Lisbeth Berg Hansen, hevur nú sent Fiskimálaráðnum áheitan um nýggjar samráðingar.

Í skrivinum sigur hon ikki eitt orð um makrel, men ynskir, at Føroyar og Noreg framhaldandi kunnu hava eitt gott fiskivinnusamstarv.

Lisbeth Berg Hansen spyr í brævinum, nær tað liggur fyri hjá Føroyum við einum fundardegi, og hvussu ein skrá kann koma at síggja út.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Gongur trekt

**Nú fleiri samráðingarfundir hava verið millum fiskimenn og reiðarar, er tað framvegis oljan, sum eins og í byrjanini skilir partarnar so nógv, at smá útlit eru fyri semju**

Vilmund Jacobsen

Alt bendir á, at rættiliga trupult er at vinna undir land við samráðingunum um nýggjan sáttmála millum reiðarar og fiskimenn.

Nøkur viðurskifti eru fingin upp á pláss, men hvørja ferð oljan kemur upp at venda, dregur sundur millum partarnar, sum framvegis standa langt frá hvørjum øðrum í spurninginum um luttøku.

Reiðarafelagið hevur eftir øllum at døma sett sær fyri, at nú skal oljan takast við og vísir til eitt protokollát um luttøku í oljuútreiðslum, sum áður er skrivað millum partarnar.

Talan er um tilsamans átta skipabólkar, ið samráðst verður um, og av hesum luttaka manningarnar í tveimum teirra í oljuútreiðslunum. Hetta er í bólkunum fyri línuskipini og flakatrolararnar.

Formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, hevur sagt, at kemur spurningurin um oljuna ikki upp á pláss, verður neyvan nakar sáttmáli.

Áðurnevnda protokollát bygdi á, at fór oljan upp um 2,90 krónur fyri lituri, skuldi – sum Viberg Sørensen tekur til – slóðast fyri, at manningin kundi verða við til at gjalda fyri oljuna.

- Nú bunkringarprísurin táttar í 4 krónur fyri liturin, vilja vit, at hesin spurningur verður loystur í samráðingunum, sigur Viberg Sørensen.

Tað eru eisini onnur viðurskifti, sum reiðarafelagið og manningarfeløgini dragast við undir hesum samráðingum, og í løtuni eru smá útlit til nakra semju millum partarnar, nú so stór ósemja er um luttøku í oljuútreiðslunum.

*vilmund@sosialurin.fo*

ADVOKATSKRIVSTOVAN

TVINGSILSSØLA AV SKIPI

Týsdagin tann 12. apríl 2011, kl. 09.45, verður í Føroya Rætti, Undir Glaðsheyggi 14, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir trolaran m/s Jaspis ow 2382, BRT 299, NRT 125.

Skipið er bygt í 1986 á Vágs skipasmiðju, Vágur. Skipið er skrásett í 1986.

Sambært skipaskrásetingini eigur P/F Faroe Fish I, 100 Tórshavn, skipið.

**Fyrireikandi** tvingsilssølufundur er ásettur at fara fram í Føroya Rætti týsdagin tann 1. mars 2011, kl. 09.45, og verður tann ið metir seg hava veð í skipinum, innkallaður til fyrireikandi tvingsilssølufundin.

Tvingsilssølan er umbiðin av Christiani Andreasen, advokati, Frúutrøð 4, Tórshavn, tlf. 353335

(j.nr.20101047), AS 2-111/2010, sum kann geva bærri upplýsingar og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja skipið.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6
FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36
WWW.JURA.FO